# Avlýsa gudstænastur tí eingin prestur er

**Í Noregi vóru ongar gudstænastur hildnar á jólum, tí eingin prestur var tøkur. Tað sama fer at gera seg galdandi á nýggjárinum**

FÓLKAKIRKJAN
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Noreg:** Nógvastaðni í landinum vóru kortini gudstænastur hildnar jólaaftan sum vanligt, tí prestar við eftirløn skipaðu gudstænasturnar.

Í Føroyum verða hildnar gudstænastur hóast eingin prestur er, tí deknarnir jú lesa lestur hesar sunnu- og haldidagarnar.

Men ymsastaðni í Noregi forðaði vánalig fíggjarstøða og mangulin uppá prestar fyri, at fólk sluppu í kirkju jóladag og 2. jóladag.

Í Vestfold-fylkinum var støðan so trupul, at persónar í øðrum størvum máttu traðka til sum prestar á jólum.

Laila Riksaasen Dahl, ið er biskupur í Vestfold harmast støðuna.

- Vit kláraðu jólini við at seta inn allar góðar prestakreftir, har tær vóru tøkar, sigur hon við norsku tíðindastovuna NTB.

Mangastaðni hava fólk í øðrum størvum tikið við ábyrgdini og hava sjálvboðin virkað sum prestar á jólum.


*Laila RiksaasenDahl, biskupur í fullsettari kirkju. Ikki allastaðni sluppu norðmenn í kirkju á jólum*

## 200.000 kr. til G!-festivalin

**Gøta:** Sølan av atgongumerkjum til G!-festivalin er longu farin í gongd, og nú hevur Eysturkommuna somuleiðis avgjørt at veita sín stuðul til hetta stóra tiltakið á Gøtusandi komandi summar.

Á fundi í kommununi fyrr í mánaðinum varð avgerð tikin um, at játta 200.000 kr.. til festivalin. Hetta varð gjørt eftir uppskoti frá trivnaðarnevndini, sum saman við borgarstjóranum mælti fíggjarnevndini at gera tað sama.

Hetta gjørdi fíggjarnevndin eisini, og tá málið var fyri á bygdaráðsfundinum 14. desember varð tað sum vera man somuleiðis einmælt samtykt.

**sb.**

## Tveir nýggjar barnagarðar komandi ár

**Skála/Søldarfjørður:** Í Runavíkar kommunu eru í løtuni iki færri enn tveir dagstovnar í gerð – ein á Skála og hin í Søldarfirði.

Báðir barnagarðarnir kunna rúma 60 børnum hvør, men í fyrstu atløgu verður pláss einans gjørt fyri 30 í hvørjum.

Ætlanin var, at teir skuldu standa lidnir nú um ársskiftið, men avtala er gjørd við byggifyritøkuna Búsetur, at teir ístaðin verða lidnir á sumri í ár. Orsøkin til hesa seinkingina er, at peningur var ikki játtaður at gera økið rundanum í hesum árinum. Hildið varð tí best, at bæði dagstovnarnir og økið rundan um skuldi verða liðugt samstundis.

Samlaði kostnaðurin fyri báðar barnagarðarnar kemur at liggja um 29 mió krónur.

- Tá barnagarðarnir eru lidnur, verða umstøðurnar á barnagarðsøkinum sera góðar, verður sagt úr Runavíkar kommunu.

**sb.**


# ÁRSINS LEIÐARADAGUR 2010

## Fokus á strategi, effektivisering & innovatión



**Teddy Jeppesen**
*Leiðari Autisme Center Vestsjælland - Besta almenna arbeiðspláss í Danmark 2005-09 Besta almenna arbeiðspláss í Evropa 2009*

Vit ynskja øllum eini gleðilig jól og eitt eydnuberandi nýggjár
Synergi



**Beinta Unni Marr Poulsen**
*Sølustjóri, FOOD, EMEA CP Kelco Kemiverkfrøðingur - Ph.D. B.Sc. innan marknaðarføring*

**Leiðarar í Føroyum**
Føroyar hevur tørv á leiðarum, ið hava visiónir og dirvi til taka avgerðir, hugsa nýtt og átaka sær leiklutin at leiða Føroyar.

**Á leiðaradegnum í ár fokusera** vit uppá strategi, effektivisering & innovatión. Vit fara at hoyra nógv viðkomandi upplegg í plenum, umframt tú kanst velja millum fleiri aktuellar verkstovur.

**Vit fara at hoyra** áhugaverd upplegg frá føroyingum, sum starvast uttanlands. Vit fara at avlesa nakrar strategiir hjá fólki, sum klára seg væl innan ymisk øki, umframt at vit fáa vitjan av fleiri útlendingum, ið eru serfrøðingar innan sítt økið.

**Pláss verður eisini fyri** kjaki, filmi umframt vit fáa okkurt serliga gott til matna.

**Um kvøldið** verður afterparty. Gleð teg eisini til henda partin av Leiðaradegnum - gott høvi at mingla og svinga saman við øðrum:-).

**Vælkomin til Ársins Leiðaradag 2010**

Annika & Ása, Synergi

**Á skránni**
*- full skrá á www.synergi.fo*

- Effektivitetur og arbeiðsgleði
- AI-Appreciative Inquiry
- Hvat er í Lille Skensved?
- Slepp eftirlitinum og skapa vinnarar
- Marknaðaranalysur kunnu geva óvæntaðar møguleikar
- Innovatiónsleiðsla
- Idéku - Amboð til hugskotsframleiðslu
- Tíðarrænarar
- Útdeligering
- SCRUM - super effektiviserings amboð frá Rugby
- Filmur & kjak
- Vit kjósa Ársins Leiðarar 2010
- Afterparty

**Tú fert heim** við størri megi og við ítøkiligum amboðum og einari rúgvu av íblástri til at loysa tínar framtíðar leiðsluproblematikkir. Tað er her tú hittir leiðarar til vitanardeiling og netverkan.

**SAGT UM LEIÐARADAGIN '09**

*"Sera variera skrá og áhugaverdir fyrilestrarhaldarar"*

*"Gott við blandingi av útlendskum og føroyskum nøvnum"*

*"Her fekk ein nakað hondgrípeligt at arbeiða við!"*

**29. januar á Hotel Føroyum**

Uppleggshaldarar




**FINN KOLLERUP**
*Stjóri í Alt4Kreativ - Kemiverkfrøðingur Ph.D. í bioteknologi - MBA í innovatión Fyrrv. deildarleiðari og granskari Novozymes*

**GUNNLEYG DURHUUS**
*Leiðari fyri Eldraøkið í Nærverkinum, Arkitektur, leiðsluútbúgvingar, NLP Master*

**ONNUR**
- *Regin Jacobsen, Ársins Leiðari '09*
- *Hjalti í Jákupsstovu, Ársins Leiðari '09*
- *Heðin Mortensen, Borgarstjóri*
- *Maibritt Højgaard, Rambøll*
- *Bjarni Askham Bjarnason, Vodafone*
- *Útlendskur gestarøðari frá Vodafone*
- *Filmur & kjakarar*

Synergi

**Les meira og tekna teg innan 15. januar á www.synergi.fo ella ring 322355**